# Hugnalig mentanarløta í Vágs Kirkju



**Eftir flaggdagshaldið, skipaði Ljómur fyri mentanarløtu í Vágs Kirkju**

MENTAN
*Dagfinn olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Skótaliðið Royndin skipaði aftur í ár fyri flaggdagshaldið í Vági. Eftir flaggdagshaldið, har Arnfinnur Bjarkhamar helt røðu, skipaði Kirkjukórið Ljómur fyri mentanarløtu í Vágs kirkju.

Kórið, og nýggi kórleiðarin og urguleikarin, Lars Mensonides úr Noreg, sungu, og á skránni var eisini upplestur. Miðnámsskúlanæmingar lósu yrkingar eftir Regin Dahl, ið andaðist fyri stuttum. Ætt hansara kom úr Vági.

Kórið sang Gloria sei dir gesungen og Sommarpsalm. Upplestur var á skránni. Upplesarar vóru Heiðrún Hammer, Arnóra Hammer, og Sólfríð Bech. Tær lósu Til Merkið, Aftur í Vági, Ikki komi eg til tín, Ogn, Sæl er tann sál og Sálmur. Alt yrkingar eftir Regin Dahl.

Ímillum sang Ljómur: Á Grækarismessu, Eg fann teg í kvæðum við lag eftir Regin Dahl og Nú rennur sólin fríð eftir J. Dahl og Kingo.

Patrick de Neergaard, prestur, endaði mentanarløtuna í Vágs Kirkju og síðani var felagssálmurin Vælkomin Summartíðin sungin. Og hetta hóskaði væl, eftir eina vakra løtu, har sólin eisini sá.

# Handlar gera samtak um innkeyp

**Matvøruhandlarnir hjá PE og INN hava gjørt innkeypssamtak fyri teir 11 handlarnar hjá fyritøkunum**

HANDIL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tær bátar matvøru-handilsketurnar, PE og INN, sum hava handlar ymsastaðni í landinum, hava nú gjørt eitt sokallað innkeypssamtak, ið skal røkja áhugamálini hjá teimum í alt ellivu handlunum, sum mynda PE og INN fyritøkurnar í dag.

Handlarnir, ið fyri bert fimm árum síðani fevndi um tvey útsølustøð, hava í dag umleið 20 prosent av samlaðu matvørusøluni í Føroyum.

- Grundað á, at fimti hvør mjólkapakki, ið verður seldur í landinum í dag fer yvir einavokkara handilsdiskum, er tað eitt krav til okkum, at vit tryggja okkara viðskiftafólki mest kappingarføru innkeypsprísirnar, siga stigtakararnir í tíðindaskrivi.

Handlarnir liggja á Argjum, í Havn, Sørvági, Norðskála, Gøtu, Skála og í Klaksvík.

Aftanfyri p/f Inn standa Jaspur Johannesen og Óla Marnar Christiansen, meðan Petur Eirik Djurhus stendur aftanfyri p/f PE. Handilin í Gøtu eigur hann saman við soninum, Bárði Djurhuus.

Sum er, eru handlarnir við í Samkeyp, men sambært Petur Eiriki Djurhuus er ongin avgerð tikin um at fara burt úr har.

- Vit fara at keypa, har vit fáa vøruna bíligast, sigur stovnarin og høvuðseigarin av PE-handlunum.



*Teir 11 handlarnir hjá PE og INN hava stovna egið innkeypssamtak*

*Savnsmynd*

